# Herverk at skjóta kettur

## Ein maður er ákærdur fyri heverk, tí hann skeyt tvær kettur, ið gjørdi familjuni lívið súrt

Randi Jacobsen

Í rættinum í gjár sat ein maður, ákærdur fyri herverk. Maðurin noktaði seg sekan, sjálvt um hann fekk at vita, at tað er herverk at skjóta kettur. Ju, hann hevi skotið ketturnar, og tað hevði einhvør annar í hansara støðu, helt hann.

Alt byrjaði við, at maðurin eitt ár búðu i Danmark, og synirnir búðu í húsunum hjá familjuni.

Eina ferð klagaðu synirnar um ringan lukt í húsunum, og so sóu teir eina stóra kettu liggja í sofuni. Kettan hevði dálkað alt til og koppað urtapottar.

Maðurin sá tað sjálvur, eina ferð hann var heima. Bara eitt vindeyga ella altanhurðin vórðu gloppað, komu ketturnar inn.

Hann hevði roynt at spurt seg fyri, hvør átti ketturnar. Onkur helt, at ommudóttur grannakonuna átti ketturnar, men tað váttaði grannakonan ikki.

### Helt tað vera villkattar

Sjálvur helt hann, at ketturnar mundu vera villkattar, sum vóru hungraðar.



*Í rættinum greiddi ákærdi maðurin frá, at ketturnar komu inn, so skjótt sum eitt vindeyga ella altanhurðin stóð opin*

Modellmynd

Viðhvørt svóvu ketturnar undir trappuni. Tá fann maðurin uppá at seta hegn fyri, so tær ikki sluppu undir trappuna.

Summarið í fjør upplivdi hesin maðurin, at tey høvdu tikið mat upp úr frosti og sett hann á borðið. Áðrenn tey vistu av, høvdu ketturnar verið inni og etið alt.

Ketturnar skræddu eisini klæðini niður av snórinum.

Eina ferð var tað manninum ovboðið.

### Kettan fór í vognin

Ein abbasonur lá í vogni í túninum og svav, og so varnaðist hann, at ein ketta hevði lagt seg oman á høvdið á barninum, sum var við at kvalast. Tá ið hann tók kettuna, klóraði hon barnið illa.

Maðurin fór tá til hunda- og kettufangaran í kommununi. Hesin lænti honum tvær kettufellur og bað hann tær sær av málinum sjálvur.

Hann hevði síðan sett fellurnar við húsini, og tá ið ketturnar vóru komnar í fellurnar, skeyt hann ketturnar í høvdið og tveitti tær burtur.

Aftaná meldaði kettueigarin mannin og kravdi endurgjald frá honum.

Eigarin varð ikki kallaður inn sum vitni til rættarfundin í dag, og málið varð tí útsett. Hunda- og kettufangarin skal eisini vitna á næsta rættarfundi.

Tann ákærdi maðurin greiddi frá, hvussu óliviligt tað var hjá teimum av hesum kettunum. Kettuhár vóru allastaðni, og yngri sonurin, sum var ovurviðkvæmur, hevði tað ikki gott. Tey noyddust at vaska og mála øll húsini, tí ketturnar høvdu bara svínað og klórað um alt húsið.

# Básarnir koma aftur

## Nú summarið er farið at halla – og drotningavitjanin er av – væntar Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, at parkeringsbásarnir á Kongabrúnni koma aftur

Randi Jacobsen

Tá ið býráðsnevndirnar í Havn viðgjørdu umsóknina um at gera Fútatorgið á Kongabrúnni, varð spurningurin frammi, um ikki teir sjey parkeringsbásarnir á brúnni skuldu takast burtur.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælti til at taka básarnar burtur, men ferðslunevndin mælti frá.

Eingin samtykt varð gjørt viðvíkjandi parkeringsbásunum, men upp undir drotningavitjanina tíðliga í summar hvurvu parkeringsbásarnir.

– Tað var í sambandi við drotningavitjanina, ólavsøkuna og alt annað, sum var í summar. Drotningin skuldu jú ganga handa vegin, tá ið hon fór út í Tinganes, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn.

Hann heldur ikki nakað øðrvísi var við tí, enn tá ið parkeringsbásar í Vágsbotni vórðu tiknir burtur fyri summarið.

Heðin Mortensen væntar, at parkeringsbásarnir koma aftur, nú summarið er við at vera av. Málið verður tikið upp í teknisku nevnd í næstum. Stabbasteinarnir, sum vórðu skiftir út við rekkverk, koma ikki aftur.

Annars er ætlanin at gera eina heildarætlan fyri at fríðka alt økið við Kongabrúnna, sigur Heðin Mortensen.

randi@sosialurin.fo




*Heðin Morternsen sigur, at gerast skal ein heildarætlan fyri økið við Kongabrúnna, men parkeringsbásarnir koma aftur*

# Hent hjálpitól

## Lítlihjálpari eitur eitt eyka hoyritól, sum fólk við vánaligari hoyrn kunnu hava stóra gleði av



*Hanna Nattestad hevur sjálv stóra gleði av hjálpitólinum*

Mynd: Álvur Haraldsen

Randi Jacobsen

Hanna Nattastad hevur niðursetta hoyrn, og haraftrat hevur hon tinnitus.

Hon hevði hoyritól, men hevði ymiskar trupulleikar av tí, og hon noyddist tí at klára seg uttan.

Hanna setti sær fyri at fáa sær útbúgving, men tað bar als ikki til, tí hon fekk ikki fylgt við, so illa hon hoyrdi.

Gjøgnum familju frætti hon um eitt tól, sum nevnist Lillehjælper og fekk sær hendir á tí.

Tá bar til.

– Hevði eg ikki fingið hetta tólið, hevði eg verið noydd at givist við útbúgvingini, sigur Hanna Nattestad.

Tólið er ætlað sum eitt eyka hjálpitól aftrat einum hoyritóli. Hoyriveik kunnu brúka tað, tá ið tey eru til fundir ella fyrilestrar, gera samrøður, lurta eftir útvarpi ella sjónvarpi. Í mongum heimum er strævið hjá teimum hoyrandi, tá ið útvarpið stendur so hart frá, fyri at tey hoyriveiku skulu kunna hoyra. Tað er ikki neyðugt við hesum tólinum.

Ein stórur fyrimunur við tólinum er, at tað ikki upptekur óneyðug ljóð, virkar bara sum ljóðstyrkjari.

Nærri upplýsingar um tólið eru at finna á www.lillehjaelper.dk

randi@sosialurin.fo

# Góð uppmøting til býráðsfundir

Sambært býráðssamtykt kunnger Klaksvíkar kommuna, hvussu er við uppmøtingini hjá býráðlimunum til býráðsfundir og nevndarfundir.

Fyrra hálvár í ár, hendi tað bara í trimum førum, at onkur ikki møtti til býráðfundir.

Uppmøtingin til nevndarfundir var ikki líka góð.

Uppgerðin sæst á heimasíðuni hjá Klaksvíkar kommunu.